Ivan Johansen Bilar:

# Fyrsta bilasøla í Føroyum fingið altjóða ISO9001 góðkenning

**Ivan Johansen Bilar hevur sum fyrsta bilasøla í Føroyum fingið altjóða góðkenning eftir ISO9001:2000 standardinum. Við skipanini kann fyritøkan skjalprógva, at hon fylgir teimum altjóða ásetingum, sum eru ásettar í skipanini - innan góðsku og tænastu**

TÍÐINDASKRIV

Hjá Ivan Johansen Bilum hava vit arbeitt nógv við at fáa góðskuna og tænastuna á eitt støði, sum vit kunnu standa inn fyri - soleiðis at kundin til einhvørja tíð kann fáa tað tænastu og góðsku hesin hevur uppiborið.

Leiðslan saman við góðskuleiðaranum avráddu tí at fara í gongd við at fáa eina góðskuskipan inn í virkisskipanina sum tryggjar at Ivan Johansen Bilar lýkur altjóða krøv tá talan er um góðsku og tænastu.

### Hvat er endamálið?

Endamálið er fyrst at nøkta krøvini frá kundunum og føroysku mynduleikunum. Síðan fyri at náa hesum, er endamálið at menna innanhýsisskipanir, sum tryggja at Ivan Johansen Bilar kann skjalprógva at krøvini fyritøkan setur sær sjálvari, verða yvirhildin.

Allar innanhýsis mannagongdir eru niðurfeldar á pappír. Við tílíkari skipan verða allar umvælingar, klárgerðingar, rustviðgerð og sølur skrásettar og eftirmettar.

Fyritøkan hevur við ISO skipanini fastar mannagongdir tá talan er um øll viðurskifti - úr rúgvuni kann nevnast: starvsfólkapolitikkurin, samstarvsavtalur - hvørjar veitarar fyritøkan samstarvar við, eftirkanning av teimum amboðum verkstaðurin nýtur, krøv sum sett verða goymslu og bilasølu, tænastustøði og umframt at Ivan Johansen Bilar eftirkannar kundanøgdsemi hvørt kvartal, við spyrjiskema sum kundarnir senda Ivan Johansen Bilum aftur.



*Ivan Johansen Bilar er fyrsta bilasøla í Føroyum, sum hevur fingið altjóða ISO9001 góðgenning. Á myndini eru: f.v. Jón Johansen og Leif Johansen stjórar, Áki Andreasen, góðskuleiðari, og Jógvan T. Joensen, goymsluleiðari*

*Mynd: Magnus Gunnarsson*

Fyri kundan er hetta sjálvandi ein trygd - og tryggjar møguleikan fyri einum sakligum samskiftið millum viðskiftafólk og fyritøku - einamest tí skrásetingarnar eru so umfatandi og ISO ásetingarnar seta stór krøv til støði á tænastu og góðsku.

Endamálið er somuleiðis at nøkta krøvini frá kundunum og føroysku myndugleikunum.

ISO9001:2000 góðkenningin fevnir um sølu og umvæling av nýggjum og brúktum Citroën, Mitsubishi, Mercedes-Benz og Chrysler/Jeep bilum, sølu av eykalutum til hesi bilamerki og Dinitrol rustviðgerð av øllum bilum.

### Stórt og umfatandi arbeiði

Nógv umfatandi arbeiði liggur aftanfyri eina slíka ISO-góðkenning.

Hjá Ivan Johansen Bilum hevur Áki Andreasen, góðskuleiðari arbeitt burturav við hesum í umleið eitt hálvt ár. Innanhýsiskunning og samskipan hevur merkt hesa fyrireiking og sjálvandi ávísar tillagingar fyri at lúka tey krøv sum altjóða ISO skipanin ásetur.

Framyvir merkir ein slík góðkenning at starvsfólkið hjá Ivan Johansen Bilum hava skyldu at fylgja teimum ásetingum sum eru í ISO skipanini - hetta er fyrst at útfylla fleiri skjøl og skráseta hesi.

Starvsfólki eigur sín avgjørda leiklut í, at ein slík skipan letur seg gera í gerandisdegnum - og arbeiðið at gerast betri og betri heldur fram, tí ISO skipanin ásetur árligt eftirlit, sum skal tryggja at Ivan Johansen Bilar ikki bara er tann fyrsta bilasølan sum kundi staðfesta eina altjóða ISO 9001:2000 góðkenning, men framhaldandi kann vísa á at fyritøkan lýkur tey krøv skipanin ásetur.

Hjá Ivan Johansen Bilum vænta vit at úrslitið av skipanini verður eitt mennandi og gott arbeiðsumhvørvi - og ikki minst at kundin kann staðfesta at góðskan og tænastan er í hásæti.

Hjá Ivan Johansen Bilum starvast í dag 26 starvsfólk, sum fevna um bilasølu, goymslu, mekaniskan verkstað og DINITROL rustviðgerð.



## Økt bjartskygni fekk rentur at hækka

MARKNAÐARRÁK

Týdningarmiklu búskaparligu uppgerðirnar úr USA í farnu viku gjørdust sum væntað bjartar, og endurtóku, at hesin búskapurin støðugt betrast. Tí hækkaðu lánsbrævarentur sum heild. Partabrøv stóðu seg væl fleiri av døgunum, men sum væntað ávirkaðu vinningsstaðfestingar, soleiðis at ávísir partabrævamarknaðir nú liggja lægri, umenn lítið, sammett við fyri viku síðani.

Nevndu búskaparligu uppgerðirnar úr USA staðfestu, at útvið 60% av stjórunum í bæði tænastu- og framleiðsluvinnuni nú eru bjartskygdir, og at hesir nú eru fleiri enn fyri mánaða síðani. Týdningarmiklari var, at sokallaða mánaðarliga arbeiðsmarknaðarfrágreiðingin úr USA, aftur hesuferð, gjørdis bjartari enn væntað. Í septembur og oktober eru nú íalt umleið 250.000 arbeiðspláss útvegaði, og hendan gongd íbirtir veruliga eina vón um, at búskaparliga framgongdin í USA nú veruliga kann staðfestast.

Flestu búskaparligu uppgerðirnar í USA, í seinastuni, hava verið framúrskarandi. Hugsandi er tí, at hesar tíðum kunnu linka aftur. Millum annað metur Marknaðarrák, at næstu dagføringarnar av búskaparvøkstrinum sannlíkt vilja fella nakað aftur. Treyðugt so; hesar vilja tó staðfesta eina góða framgongd, men á einum lægri stigi. Hetta kann føra við sær, at lánsbrævarentur og partabrøv, sum í seinastuni er hækkaðar heilt fitt, kunnu fella nakað aftur. Gongdin sum frálíður vil kortini vera hægri rentur og partabrævakursir.

Farna hósdag hækkaði bretski tjóðbankin teirra leiðandi rentu 0,25%-stig. Marknaðarrák metur kortini ikki, at ein slík skal væntast frá evropeiska miðbankanum og hervið heldur ikki danska tjóðbankanum næstu mánaðirnar. Orsøkin er, at enn gongur striltið í evruøkinum; hóast ein glotti er í eygsjón.

Í farnu viku kunngjørdu Cisco og TDC góðar roknskapir, meðan teir hjá GN Store Nord, Lundbeck og NEG Micon gjørdust sonn vónbrot; tí fall KFX vísitalið. Tíðarskeiðið við roknskaparkunngerðum er nú um at verða av. Tó kunngerða m.a. Dell, Siemens og Deutsche Telecom hesa vikuna.

Ein friðarlig vika kann væntast, tí fáar heilt týdningarmiklar uppgerðir verða kunngjørdar. Hugsandi kunnu lánsbrævarentur tískil fella eitt sindur aftur hesa vikuna. Áhugi sýnist at verða fyri partabrøvum. Hinvegin kunnu hesi tí standa seg væl. Stigið á marknaðunum er tó høgt, so sannlíkindi er framvegis fyri vinningsstaðfestingum.

**Rentur**

| | Renta | +/- %-stig |
|---|---|---|
| Diskonto | 2,00% | 0,00% |
| 2 ára lánsbræv | 3,00% | 0,10% |
| 5 ára lánsbræv | 3,89% | 0,10% |
| 10 ára lánsbræv | 4,65% | 0,09% |

**Partabrævavísitøl**

| | Kurs | +/- % |
|---|---|---|
| KFX, Danmark | 257,3 | -2,1% |
| OMX, Svøríki | 620,9 | -0,2% |
| DJ Stoxx 50, Evropa | 2.574,1 | -0,7% |
| S&P 500, USA | 1.053,2 | -0,9% |

**Íløgufeløg**

| | Kurs | +/- % |
|---|---|---|
| Lánsbræv í DKK | 106,16 | -0,4% |
| Evru Lánsbræv | 163,50 | -0,3% |
| Norsun Partabrøv | 72,92 | 0,8% |
| Altjóða Partabrøv | 74,74 | 1,8% |

**Gjaldoyra**

| | Kurs | +/- % |
|---|---|---|
| USD | 646,54 | -0,7% |
| EUR | 743,55 | 0,0% |
| GBP | 1.081,54 | -0,6% |
| NOK | 99,16 | -0,2% |

Vika 46, 2003



# Havnatindur var ikki í havsneyð

**- Eg haldi, tað var langt úti av Sjóbjargingarstøðini at senda tíðindini um Havnatind út, soleiðis sum teir gjørdu, sigur Elmar Petersen, sum leigar Havnatind frá Ólavi Waag Høgnesen**

HAVNATINDUR

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tíðliga seinasta fríggjamorgun boðaði løgreglan Sjóbjargingarstøðini frá, at línubáturin, Havnatindur KG 464, var í havsneyð norður úr Eiðisflógva. Sambært tíðindaskrivinum, sum Sjóbjargingarstøðin seinni sendi út, skiltist, at eldur hevði verið í skipinum og at skipið, tá ið ringast stóð til, var um at søkka við trimum monnum umborð.

### Misvísandi tíðindi

Elmar Petersen, sum leigar Havnatind frá Ólavi Waag Høgnesen, sigur seg ikki skilja, hvussu Sjóbjargingarstøðin kundi senda eitt slíkt tíðindaskriv út til almenningin – eftir, at tað var greitt, hvussu veruliga støðan umborð á skipinum var.



*- Eg skilji ikki, hvussu Sjóbjargingarstøðin kundi senda eitt slíkt tíðindaskriv út til almenningin – eftir, at tað var greitt, hvussu veruliga støðan umborð á Havnatindi var, sigur Elmar Petersen, sum leigar skipið frá Ólavi Waag Høgnesen*

- Eldurin umborð á Havnatindi var ikki størri enn eldurin í einum svávulpinni, sum brennur. Skipið lak ongantíð, og motorurin steðgaði heldur ikki.

Elmar sigur, at Havnatindur var staddur norður úr Barinum, tá ið manningin varnaðist brendaroyk.

- Alt er gamalt umborð, og soleiðis er eisini við elleiðingini. Ein leidningur í startpanelinum hevur helst verið skamfílaður og hevur elvt til kortslutning.

Elmar sigur, at tað var ongantíð eldur í Havnatindi.

### Streymurin fór

Hann vísir á, at kortslutningurin førdi til, at elleiðingin fór, og tí fekk manningin ikki boðað frá, hvussu vorðið var.

- Tað var ikki, fyrr enn teir komu inn í Eiðisflógva, at manningin fekk boðað frá óhappinum við eini gsm-telefon, sum var umborð.

Gsm-telefonin hoyrist ógvuliga illa norðanfyri, og tað er ikki, fyrr enn tú ert heilt undir landi, at hon onkustaðni hoyrist.

Elmar sigur, at tá ið manningin umborð á Havnatindi varnaðist brendaroyk og sá, hvussu vorðið var, avgjørdu teir at sigla móti Eiðisflógva.

Hann heldur, at løgreglan fekk fráboðanina um støðuna umleið ein tíma eftir, at el-veitingin var farin.

- Sjálvandi kundi manningin ikki vita, um nakað meira kundi standast av, at leidningurin í startpanelinum var kortsluttaður. Tí avgjørdu teir at boða frá, hvussu vorðið var. Manningin vildi eisini tryggja sær, at hjálp var at heinta, um nakað skuldi hent, tá ið teir komu inn í Eiðisflógva.

### Ikki í havsneyð

Elmar leggur dent á, at hóast sjaskveður var hendan morgunin, vóru hvørki manning ella skip nakrantíð í vanda. Eingin var í havsneyð, soleiðis Sjóbjargingarstøðin boðaði frá í tíðindaskrivinum.

- Havnatindur kom á Eiði við engari hjálp, og ein tíma eftir, at skipið var komið til bryggju, lá Brimil útfyri. Skipið lak ikki, men nakað av kjalarvatni var í skipinum. Við tað, at pumpurnar umborð ikki virkaðu, tí eingin streymur var, bað manningin á Havnatindi Brimil tøma skipið fyri kjalavatn.

Elmar Petersen sigur, at tíðliga fríggjamorgunin var hann í Havn við manningini á Havnatindi, sum allir búgva í Havn.

Havnatindur er klárur at fara til fiskiskap aftur, og manningin er hin sama.

# Nýggjar bátabrúgvar í Saltangará

**- Kommunan hevur keypt ein part av einum alibrúki, sum vit síðan hava sveisað saman til bátabrúgvar. Armarnir eru keyptir frá Kára Johannesen, og hetta vísir seg at rigga væl, sigur vatnmeistarin, Herman á Líknagøtu**

BÁTAEIGARAR

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Seinastu tíðina hevur verið arbeitt við at bøta um atløgumøguleikarnar hjá teimum størru glastrevjabátunum og øðrum størri bátum í Runavíkar kommunu.

Kommunan hevur nevniliga lagt út bátabrúgvar fram vegsíðuni undir Teymavirkinum í Saltangará, beint aftanfyri atløguplássið hjá gomlu sluppini, Høganes.



*Bøtt er nú um umstøðurnar hjá teimum størru glastrevjabátunum og øðrum størri bátum í Runavíkar kommunu.*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

### Gamalt alibrúk

Herman á Líknagøtu, vatnmeistari, sigur, at hetta í fysta lagi er eitt arbeiði, sum vatnverkið í kommununi hevur tikið sær av.

- Kommunan hevur keypt ein part av einum alibrúki, sum vit síðan hava sveisað saman til bátabrúgvar. Armarnir eru keyptir frá Kára Johannesen, og hetta vísir seg at rigga ógvuliga væl, sigur vatnmeistarin, Herman á Líknagøtu.

Hann vísir á, at nýggju atløguplássini undir Teymavirkinum eru ætlaði bátum, sum eru 33 føtur og størri.

### 9 bátapláss

- Vit hava lagt 8 brúgvar út, sum geva sjey pláss innan fyri armarnar og tvey pláss á ytru endunum. Sostatt verður pláss fyri 9 bátum við nýggju brúgvarnar, sigur hann.

Herman á Líknagøtu sigur, at fyrsti báturin legði til brúgvarnar seinasta leygardag.